## Sangmøti við fjølbroyttari luttøku



Tað munnu vera fá sum ivast í, at tey í samkomuni Oasan í Hoyvík dáma sera væl tónleik og sang. Hetta sermerkir samkomulívið og fer somuleiðis at sermerkja møtið sunnudagin. Tá verður nevniliga eitt serstakt sangmøti við luttøku úr samkomuni og aðrastaðni frá. Hetta møtið byrjar kl. 18 og verða luttakararnir Terji og Hanna úr Kollafirði og Bygdardreingir av Toftum, sum eru menn úr Brøðrasamkomuni. Umframt hesar fara fólk úr samkomuni at syngja, systrarnar Annika og Sigrid og Oasubrøðurnir. Aftaná verður møguleiki at njóta hugnaligan felagsskap við einum drekkamunni

## Norðljómur byrjar undirvísingina

Musikkskúlin í Eiðis og Sunda kommunum, Norðljómur, fer nú at byrja aftur. Í vetur kann skúlin bjóða undirvísing í klaver- og urguspæli, klarinett, saksofon, blokkfloytu, tvørfloytu, kornett, althorni, eufonium, baryton, guitar, tuba og í trummuspæli. Kostnaðurin fyri at spæla er settur til 1.000 kr. Haraftrat kemur eitt gjald uppá 300 kr. um árið fyri leigu av ljóðføri. Sagt verður, at tey, ið spæla, mugu vera íðin, møta til tímarnar og venja regluliga heima. Tað er somuleiðis skylda hjá næmingunum at taka lut í konsertum og samanspæli, sum musikkskúlin skipar fyri.

# Timburhandil rýmir av Sandi

**Ánararnir av Timburhandilin Sand eru so ónøgdir við framferðina hjá borgarstjóranum á Sandi, Páll á Reynatúgvu, at teir nú flyta virksemið til Skopunar**

ÓNØGD

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eigararnir av Timburhandilinum Sand eru so ónøgdir við framferðina hjá borgarstjóranum á Sandi, Páll á Reynatúgvu, at teir hava gjørt av at flyta virksemi sítt til Skopunar. Sands bygd verður tískil ein handil fátækari*

Tvisturin millum ánararnar av Timburhandilin Sand og borgarstjóran á Sandi, Páll á Reynatúgvu, liggur í einum avtalaðum leigumáli, sum sambært ánarunum ikki verður virt av borgarstjóranum.

Ósemjan kom fram í Oyggjatíðindum mikudagin, og hetta hevur fingið Timburhandilin Sand at gera viðmerkingar til málið.

Í Oyggjatíðindum varð ført fram, at tað var nærum handfast, tá Páll á Reynatúgvu fór í Timburhandilin at minna á, at felagið var uppsagt at fara úr hølunum 1. januar 2007. Men eigararnir taka nú til orðanna og vísa á, at sambært avtalu, er leigumálið galdandi frá 1. september 2004 og minst trý til fimm ár fram. Við øðrum orðum kann Timburhandilin í fyrsta lagi krevjast úr hølunum á vári 2008, tí uppsagnartíðin var seks mánaðir.

Trupulleikin er, sambært ánarunum av Timburhandlinum, at hóast hendan avtalan varð gjørd á sumri 2004, so hevur kommunan enn ikki fingið upp í lag at skriva sáttmála um leiguna. Hartil vísa eigararnir av Timburhandlinum á, at rokningar fyri leigu síðani eru komnar frá kommununi, sum liggja munandi omanfyri ta príslegu, sum avtalað varð á áðurnevnda kommunustýrisfundi.

### Innanhýsis viðurskifti

Í tíðindaskrivi siga teir tríggir, William Sand Davidsen, Niels Johannes Tjaldrastein og Jón Sand Davidsen, at »tað harmar okkum almikið, at innanhýsis vitan í Sands kommunu, sum Páll á Reynatúgvu hevur ábyrgd av, eru endað í Oyggjatíðindum. Vit meta, at hetta skaðar okkara umdømi og virksemi so mikið, at vit í hesum skrivi mugu kunna um tey fakta, sum ikki stóðu í greinini«.

Í Oyggjatíðindum verður sagt: »Vit síggja eisini í skjali, blaðið hevur fingi innlit í, at Sands bygdaráð samtykkir einmælt, at lata matrikkul 171c, ið er eitt øki uppá 2000 fermetrar, til Timburhandilin Sand«. Blaðið hevur sostatt biðið um og fingið innlit í hetta skjal.

Men seinni verður eisini sagt í Oyggjatíðindum í beinleiðis talu: »Men tú hevur jú hvørki goldið grundøkið, og tíans heldur leigu í verandi hølum í trý ár?«

Hetta átti at verið viðurskifti, ið koma undir tagnarskyldu, og sum ikki eiga at verða likin, og er uttan iva tað, ið sipað verður til í viðmerkingunm frá eigarunum av Timburhandilin Sand.

### Eigararnir harmast

Teir tríggir greiða í skrivinum frá, at umframt at leigan gjørdist órímiliga langt frá tí, avtalað var, hevur tað somuleiðis gingið órímiliga long tíð at fáa avgreitt umsóknina um grundstykkið, ið søkt varð um.

Eisini verður víst á, at kommunan skyldar Timburhandlinum munandi meiri pening enn grundstykkið kostar.

Hendan tvístøðan ger altso, at eigararnir av Timburhandlinum hava tikið hetta til eftirtektar.

»Aftan á seinastu munnligu uppsøgnina, eitt hálvt ár áðrenn minsta mark fyri tíðina, vit fingu avtalað, og tað, sum vit upplivdu sum ein sera primitivan atburð av borgarstjóranum, Páll á Reynatúgvu, í handlinum seinasta fríggjadag, har neyðugt var at vísa honum durafjórðingin, taka vit avleiðingarnar og rýma úr bygdini«.

Harmast verður samstundis um, at bygdarfólkið skal missa ein handil, eins og vónað verður, at hetta verður einasta almenna viðmerking teirra í málinum.

At enda verður í skrivinum upplýst, at Timburhandilin Sand letur upp í gomlu handilshølunum hjá Hermanni Winther í Skopun týsdagin 4. september.

Roynt hevur verið til fánýtis í allan morgun at fingið eina viðmerking frá Pálli á Reynatúgvu, men hetta hevur tíverri ikki eydnast.

# Stuttleikabátur til 300 milliónir

**Nú ber til at fara charterferð umborð á stuttleikabátinum Lady Lola. Prísur fyri eina viku: tvær milliónir krónur**

FERÐALÍV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av heimsins flottastu stuttleikabátum kann nú leigast fyri tvær milliónir krónur um vikuna.

Báturin eitur Lady Lola og er 62 metrar langur. Tað var ektaparið Lola og Duane Hagadone, sum í 2002 lótu bátin byggja. Fleirmilliónungurin Duane hevði vunnið pengar sínar við handlan av ognum og dagblaðsútgávu, og hann og konan vildu nú sigla jørðina runt. Til endamálið var Lady Lola, sum kostaði parinum 50 milliónir dollarar (útvið 300 milliónir krónur) so bygd.

Eftir at hava siglt jørðina runt seldi parið bátin, sum nú verður leigaður út til sigling í Miðalhavinum.

Og hevur mann ráð, fær mann eisini alt tað, ein kann ynskja sær. Pláss er fyri tíggju gestum í fimm suitum, og mannningin telur fimtan. Til ber enntá at spæla golf umborð. Tað gongur fyri seg á tann hátt, at medda verður eftir nøkrum boyum, ið verða settar út aftanfyri bátin, og so liggja matrósar í einum skjóttgangandi báti og fiska golfbóltarnar upp við neti.

Sjálvandi er eisini svimjihylur við fossi, uttandura biografur og hópurin av plássi at sóla sær. Og skuldi onkur av lesarum blaðsins havt hug at sett eina viku av til tað reina luksus, ber til at leiga bátin á charterworld.com

(kelda: qxo.dk)



*Flott sær hon út, Lady Lola*